# Atlantic Airways strikað

**Atlantic Airways er nú strikað úr lógartekstinum um nýggju tyrlutænastuna. Vinnunevndin hevur skrivað nýtt álit, men nú tekur andstøðan ikki undir við málinum**

TYRLUTÆNASTA
*Magnus Dam*

Vinnunevndin hjá løgtinginum legði mánadagin enn eitt álit fyri løgtingið í málinum um tyrlutænastuna, sum ætlanin var at gera sáttmála við Atlantic Airways um. Málið varð beint aftur í nevnd í síðstu viku, tí tingmenn vóru ikki nøgdir við uppskotið hjá Jørgen Niclasen, landsstýrismanni.

Eitt nú hildu tingmenn tað vera skeivt, at eitt ávíst felag er nevnt í lógartekstinum, tí talan tá verður um at gera eina lóg, sum bert er galdandi fyri eitt einstakt felag. Tingmenn hildu eisini, at landsstýrismaðurin ikki hevur gjørt sítt fyrireikingararbeiði nóg væl og lýst, um talan veruliga er um bestu loysnina.

Landsstýrismaðurin ætlaði at gera ein tíggju ára sáttmála við Atlantic Airways um tyrlutænastuna. Felagið skuldi eftir ætlan fáa 14 milliónir krónur um árið í tíggju ár fyri at reka tyrlutænastuna. Jørgen Niclasen segði við Sosialin í gjár, at ein orsøk til, at hann hevur skrivað Atlantic Airways í lógartekstin, er, at hann vil hava tyrlutænastuna og hendan førleikan á føroyskum hondum. Og motivini hjá landsstýrismanninum eru harumframt politisk.

– Við at hava eitt føroyskt tyrlufelag, ber seinni til at privatisera hesa flúgvingina. Annaðhvørt við eini fullkomnari privatisering av Atlantic Airways, ella við partvísari privatisering av eitt nú bara tyrludeildini, segði landsstýrismaðurin.

## Nýtt álit

Men løgtingið var ikki nøgt við uppskotið, og eftir áheitan frá einum meiriluta í løgtinginum hevur Vinnunevndin nú viðgjørt málið av nýggjum. Meirilutin í nevndini, samgonguumboðini, hevur í nýggja álitinum strikað navnið Atlantic Airways, so lógaruppskotið nú ikki snýr seg um eitt einstakt felag. Tíðarskeiðið er kortini framvegis hitt sama – 10 ár.

Um løgtingið tekur undir við broytingaruppskotinum hjá meirilutanum, so stendur tað landsstýrismanninum frítt at gera sáttmála við eitthvørt felag. Men hann kann so eisini velja at halda fram við upprunaligu ætlanini, sum var at lata Atlantic Airways uppgávuna næstu tíggju árini.

## Minnilutin framvegis ímóti

Teir tríggir andstøðutingmenninir tóku allir undir við uppskotinum, tá ið vinnunevndin skrivaði fyrsta álitið í málinum. Teir høvdu kortini ávís fyrivarni, og tveir teirra atkvøddu fyri at beina málið aftur í nevnd.



Alfred Olsen, Henrik Old og Dan R. Petersen siga í nýggja álitinum enn einaferð, at teir eru sera ónøgdir við fyrireikandi arbeiðið, sum er lagt í uppskotið. Landsstýrismaðurin hevur ikki kannað allar møguleikar og lýst fyri løgtinginum, um hetta er besta og bíligasta loysnin, siga teir.

Teir halda, at ognarviðurskiftini eru ógreið og seta spurnartekin við, um Atlantic Airways einaferð í framtíðini kann skilja tyrluvirksemið frá hinum virkseminum í felagnum og lata eitt dóttirfelag reka tyrlutænastuna. Teir tríggir siga seg heldur ikki hava fingið at vita, um tað er rætt at gera ein sáttmála, sum er galdandi í tíggju ár.

Orsakað av nógvu ivamálunum sigur minnilutin seg ikki kunna taka undir við uppskotinum, sum tað nú liggur á borðinum.

Álitið frá vinnunevndini fór niðan aftur í løgtingið mánadagin, og løgtingið fer helst at viðgera málið aftur fyri jól.

# Fíggjarlógin klár til 3.viðgerð

**Løgtingið samtykti mánadagin fíggjarlógina við aðru viðgerð. Øll broytingaruppskotini hjá samgongutingmonnum uttanvórðu samtykt, meðan uppskotini hjá andstøðunu fullu eitt fyri og annað eftir**

FÍGGJARLÓG 2001
*Magnus Dam*

Fíggjarlógin fyri næsta ár skal nú bert hava triðju og endaligu viðgerðina í løgtinginum, áðrenn hon er liðugt avgreidd. Eftir eina rættiliga drúgva aðru viðgerð mánadagin, samtyktu 20 tingmenn fíggjarlógina.

Nógv broytingaruppskot vórðu løgd fram á tingfundinum mánadagin. Umframt broytingaruppskotini frá meirilutanum og minnilutanum í fíggjarnevndini, løgdu einstakir tingmenn og tingmenn í felag fleiri broytingaruppskot fram.

## Vildi hava lógina aftur í nevnd

Eitt uppskot um at beina fíggjarlógina aftur í fíggjarnevndina til nærri viðgerð fall. Tað var Jóannes Eidesgaard, sum legði uppskotið fram. Hann og restin av Javnaðarflokkinum vóru misnøgdir við ávís viðurskifti í uppskotinum. Eitt nú er Fíggjarmálastýrið komið við einari rúgvu av broytingaruppskotum, meðan fíggjarnevndin hevur viðgjørt uppskotið, og Vilhelm Johannesen átalar í álitinum frá fíggjarnevndini harðliga hesari mannagongdini. Men tað var serliga uppskotið um at, Landsverkfrøðingurin nú skal hava um hendi alt alment viðlíkahald, sum fekk øði í í løgtinginum í gjár.

Áður hava teir einstøku landsstýrismenninir havt eina ávísa játtan á fíggjarlógini at ráða yvir til viðlíkahald. Men allar hesar kontoirnar eru nú fluttar til Landsverkfrøðingin at umsita, og Javnaðarflokkurin heldur millum annað, at hetta skerjir frælsið hjá landsstýrismonnunum. Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Miðflokkurin atkvøddu fyri uppskotinum hjá Jóannesi Eidesgaard um at koyra fíggjarlógina aftur í nevnd, men teir 18 samgongutingmenninir atkvøddu ímóti, og sostatt kundi løgtingið halda fram við atkvøðugreiðslunum.

## 59 milliónir dýrari

Viðgerðin í fíggjarnevndini endaði við at gera samfelagið góðar 59 milliónir krónur dýrari at reka næsta ár, enn landsstýrið upprunaliga hevði ætlað. Landsstýrið kom sjálvt við teimum størstu og dýrastu broytingunum. Eftir tilmæli frá Fíggjarmálastýrinum legði meirilutin í fíggjarnevndini fram broytingaruppskot, sum hækkaði útreiðslurnar 49 milliónir krónur, og meirilutin legði harumframt broytingaruppskot fram, sum hækkaði útreiðslurnar góðar tíggju milliónir krónur. Øll hesi broytingaruppskotini vórðu samtykt.

Nakrar av teimum dýrastu broytingunum fara til rentustuðul, Skopunar havn og Strandfaraskip landsins. 8,9 milliónir krónur skulu brúkast meira til rentustuðul enn upprunaliga mett, 3 milliónir til at umbyggja og tillagað portrið í Skopunar havn, og Strandferðslan hevur orsakað av høga oljuprísinum brúk fyri 9 milliónum afturat. Pengarnir skulu eisini brúkast til at røkja Skálafjarðarleiðina fyri. Ætlanin var annars at niðurleggja farleiðina.

Landsstýrið hevur eisini lagt fram uppskot fyri løgtingið um at broyta pensjónslógina, og 5 milliónir krónur skulu brúkast eyka til fyritíðarpensjónir í hesum sambandinum.

## Gongd á tunnilsarbeiðið

Meirilutin í fíggjarnevndini gjørdi fleiri smærri broytingar í fíggjarlógini, sum vórðu samtyktar, og millum annað kom meirilutin ásamt um at fáa gongd á tunnilsarbeiðið millum Øravík og Hov næsta ár. Hendan játtanin er tí hækkað til 4 milliónir næsta ár.

Meirilutin í fíggjarnevndini kom eisini ásamt um at játta 3,5 milliónir krónur til ein nýggjan bústovn til sálarsjúk, sum eitt nú búgva á psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum, men ikki eru í viðgerð á sjúkrahúsinum. Tey hava onga aðrastaðni at vera, og tær 3,5 milliónirnar skulu brúkast til at fáa gongd á at byggja ella keypa hús til bústovnar til sálarsjúk.

## Minnilutin vrakaður

Umboðini hjá andstøðuni í fíggjarnevndini royndu seg eisini við fleiri broytingaruppskotum á tingfundinum mánadagin, men einki teirra kom heilskapað ígjøgnum. Tey vóru feld eitt fyri og annað eftir.

Tilsamans høvdu hesi uppskotini dýrkað fíggjarlógina góðar 30 milliónir krónur. Tey snúðu seg millum annað um at hækka játtanina til Landssjúkrahúsið 5 milliónir, játtanina til Klaksvíkar sjúkrahús 2 milliónir og Suðuroyar sjúkrahús 1,2 milliónir krónur. Minnilutin mælti eisini til at játta 5 milliónir krónur afturat til bústovnar til sálarsjúk og 2 milliónir eyka til medicoteknisk tól umframt at hækka viðbótina til pensjónistar 10 milliónir krónur. Uppskotini fingu kortini bert atkvøðurnar frá andstøðuni, og tey vóru øll feld.

Tað sama vóru tey níggju uppskotini, sum komu í síðstu løtu frá einstøkum tingmonnum. Tað størsta av uppskotinum kom frá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum í felag, sum vildu hava løgtingið at hækka játtanina til at útbyggja landssjúkrahúsið við 23 milliónum, so samlaða játtanin kom upp á 58 milliónir krónur næsta ár. Uppskotið fekk 13 atkvøður og fall.

Ein viðgerð er framvegis eftir, og tingmenn hava møguleika at koma við broytingaruppskotum millum aðru og triðju viðgerð, so tað er ikki óhugsandi, at fíggjarlógin broytir skap einaferð afturat, áðrenn hon er endaliga avgreidd.



# Í føðingardegi hjá arbeiðsfólkinum

FAKFELØG
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Allan seinnapartin mánadagin og um kvøldið við streymaði fólk í hølini hjá Føroya Arbeiðarafelag í gjár at heiðra felagnum, sum mánadagin fylti 75 ár. Fólkini, sum vóru í miðdeplinum hendan dagin vóru sjávlsagt nevndin í Føroya Arbeiðarafelag og kanska tann sum var mest í miðdeplinum var leiðarin, forkvinnan, ein av okkara mest markantu fakfelagsleiðarum seinastu 20 árini, Ingeborg Winther.

Stór lagkøka var evna til føðingardagin við árunum skrivað omaná.

Landsstýrið var umboðað av Bjarna Djurholm og umboð fyri nógv fakfeløg, stovnar og onnur vitjaðu mánadagin. Eisini vóru limirnir í FA væl umboðaðir.

Sosialurin hevur seinastu dagarnar neyvt viðgjørt framtíðarætlaninar hjá Føroya Arbeiðarafelag og ein av høvuðssetningunum hjá felagnum er at tryggja lønmóttakarunum ein eftirlønarskipan, sum er virðilig.

Sosialurin ynskir Føroya Arbeiðarafelag tillukkum við teim fyrstu 75 árunum.



*Nógv vitjaðu Føroya Arbeiðarafelag mánadagin, millum onnur landsstýrismaðurin Bjarni Djurholm.*

*Myndir: Jonhard Hammer*

# Nyrup tekur undir við sjálvstýrislógini

**Danski forsætisráðharrin tekur undir við sjálvstýrislógini hjá Javnaðarflokkinum, sum inniber sjálvstýri, sum ikki kann kallast aftur**

SJÁLVSTÝRISLÓGIN
*John Johannessen*

Tað eru stórir møguleikar fyri at skipa føroyskt sjálvstýri á ein nýggjan og øðrvísi hátt innan fyri ríkisfelagsskapin.

Hetta ger danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, greitt í einum svari uppá fyrispurning frá fólkatingsliminum, Jóannes Eidesgaard.



*Poul Nyrup Rasmussen heldur, at ein sjálvstýrislóg kann tryggja Føroyum nógv størri sjálvræði*

Jóannes Eidesgaard setti herfyri danska forsætisráðharranum ein sokallaðan grein 20 spurning, har hann spyr forsætisráðharran, um uppskot Javnaðarfloksins til eina sjálvstýrislóg kann vera grundarlag fyri stjórnarrættarliga sambandinum millum Føroyar og Danmark.

## Kunngerast í ST

Danski forsætisráðharrin vísir á, at tað ber til at fremja eina nýskipan í stjórnarrættarligu viðurskiftunum, soleiðis at Føroyum verður latið alt vald á løggevandi og umsitingarliga økinum, burtursæð frá nøkrum økjum, har grundlógin ikki loyvir tí.

Harafturat staðfestir danski forsætisráðharrin eisini, at tað ber til at tryggja, at nýggi sáttmálin ikki kann takast aftur. Hetta skal gerast við at boða øllum limalondunum í ST frá, at núverandi føroyska heimastýri er broytt til eitt nýtt føroyskt sjálvstýri.

Men danski forsætisráðharrin vísir samstundis á, at samanhangur skal vera millum politiska og fíggjarliga ábyrgd. Taka vit yvir politisku ábyrgdina av málsøkjum, skulu vit eisini taka yvir fíggjarligu ábyrgdina.

## Gera sjálvi av

Poul Nyrup Rasmussen heldur, at føroyingar hava nógvir møguleikar fyri víðkaðum sjálvræði í einari sjálvstýrislóg. Hann vísir millum annað á, at vit kunnu fáa fult vald á revsirættarliga økinum, familju- og arvarættarliga økinum, og harafturat heldur hann, at Føroyingar kunnu menna sítt vald á uttanríkispolitiska økinum.

Men samstundis ger danski forsætisráðharrin greitt, at tað sjálvsagt er føroyska fólkið, ið ger av, um vit ynskja at verða verandi í ríkisfelagsskapinum ella ei.

# Minstulønirnar í Føroyum liggja hægri

**Vert er her at hava í huga, at sera høgu minstulønirnar í Føroyum ger lønarskipanina stirvna, og tí síggja vit ikki bonus skipanir í so stóran mun, sum vanligt er londunum rundan um okkum, skrivar Vinnuhúsið**

MINSTULØNIR
*Ólavur í Beiti*

Í seinasta tíðindaskrivinum frá Vinnuhúsinum undan jólum, verður sagt viðvíkjandi nýggju frágreiðingini frá Búskaparráðnum at hesar frágreiðingar eru eitt týdningarmikið amboð í eftirlitinum við gongdini í samfelagnum og tí rikna politikkinum.

Sjálvt um seinasta frágreiðingin sum heild er góð og áhugaverd, sýnist eitt mistak at vera komið í viðvíkjandi lønarlagnum í Føroyum. Í einum broti í samandráttinum verður sagt:

»Framgongd er í øllum pørtum av búskapinum, men tað er serliga vinnulívi á landi, sum hevur stóran vøkstur í løtuni. Enn liggja lønirnar væl niðanfyri tær í grannalondunum. Stendur búskaparliga byrðurin við, kann væntast, eitt ávíst trýst á lønirnar.«

At trýst kann væntast á lønirnar, tá tað búskaparliga gongur væl, er eingin loyna, men at lønirnar liggja væl niðanfyri tær í grannalondunum, er als ikki rætt, skrivar Vinnuhúsið.

## Eingi hagtøl

Í Føroyum hava vit eingi hagtøl fyri miðal útgoldnar lønir, og tí kunnu hesar ikki samanlíknast við grannalondini. Hyggja vit at sáttmálaásettum lønarsatsum, sæst, at avtalaðu minstulønirnar í Føroyum liggja hægri enn í allar flestu londum, sí talvuna.

Ført verður ofta fram, at útgoldna miðallønin í grannalondunum liggur nakað væl omanfyri sáttmálaásettu minstulønina. Hetta er rætt, men eisini í Føroyum eru tað ikki so fáar vinnugreinir, sum gjalda omanfyri neyðugu sáttmálalønina. Hetta er m.a. galdandi fyri handverk, verkstaðsíðuna, aling og tænastuvinnuna.

Vert er her at hava í huga, at sera høgu minstulønirnar í Føroyum ger lønarskipanina stirvna, og tí síggja vit ikki bonus skipanir í so stóran mun, sum vanligt er londunum rundan um okkum, skrivar Vinnuhúsið.

| Land | Tímaløn | Eftirløn | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Ísland | 41,41 | | 41,41 |
| UK | 45,88 | | 45,88 |
| Grønland | 63,84 | 1,98 | 65,10 |
| Noreg | 79,19 | | 79,19 |
| Danmark | 82,40 | 4,2 | 85,86 |
| Føroyar | 83,72 | 3 | 86,23 |

